## Veðurkonsert í Norðurlandahúsinum

Leygardagin hevur Kastrup Kammerkor konsert, har veðrið er evnið í framførslunum. Konsertin er um veðurfyribrigdir, so sum sól, vindur, affall og skýgg, men eisini viðger hon tað huglag, sum norðurlendskir yrkjarar og tónasmiðir hava funnið í dagsins gongd og teimum skiftandi árstíðunum. Konsertskráin er ein skiftan millum sang og hugleiðingar hjá Jesper Theilgaard, sum binda teir ymisku sangirnar saman.



## Nýggja brúðarvísu

Sláið Ring, sum er landsfelag føroyskum dansi at frama, býður nú áhugaðum at taka lut í kapping um at yrkja nýggja brúðarvísu. Sum so er kappingin púrasta opin, men nakrar treytir verða tó settar: Hon skal fyrst og fremst venda sær til brúðarparið. Hon skal vera frásøgukend. Hon skal hava eitt viðkomandi niðurlag. Tað skal taka umleið 8-10 minuttir at kvøða vísuna ella kvæðið. Hartil tilskilar Sláið Ring sær rætt at prenta og geva út øll handritini, ið koma inn, og sum nevndin metir eru egnað at geva út. Fyrsta virðislønin í kappingini er 50.000 kr., men nevndin kann eisini gera av onga virðisløn at lata.

# Tá túsundtalið syngur við



*Hann er tann ektaða vøran. Guitarin og røddin eru nóg mikið til at fanga fjøldina. Og fríggjakvøldið verður hendan væntandi størri enn nakrantíð*

**Í fjør var tað ongan tíð ætlanin, men at enda stóð Hanus G. Johansen á stóra pallinum á festivalinum. Í ár er tó eingin slingur í valsinum. Tá Scorpions eru lidnir á pallinum, verður tað stóri føroyski vísusangarin, sum fer at halda lív í fjøldini**

SUMMAR FESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hanus er fyrst og fremst kendur sum tann fólkakæri vísusangarin, sum dugir at fanga einhvørja mannfjøld – um hon er stór ella lítil.

Millum annað soleiðis varð Hanus Gærdum Johansen lýstur í blaðnum, sum festivalfyrireikararnir í fyrradagin sendu á gøtuna saman við Sosialinum.

Og hetta er neyvan at taka munnin ov fullan. Fáur kann við so einføldum midlum – bara røddi og guittarin – sum Hanus seta lív í fjøldina. Ikki minst hava framúrskarandi tulkingar hansara av Pól F. vunnið sær kult-status her á landi. Og at stóri vísusangurin nú fjórða árið á rað er partur av festival-skránni, sigur væl ikki so lítið um, hvat virði fyrireikararnir síggja í at hava Hanus á skránni.

Og sjálvur tykist sangarin so einki at hava ímóti, at hann aftur er biðin til kanska størsta føroyska tónleikapallin av øllum.

Eg velji í øllum førum at taka tað sum eina stóra viðurkenning, at eg framhaldandi verði biðin um at koma til Festivalin. Sjálvur havi eg eisini tætt tilknýti til Klaksvík, og tí er stuttleikin ikki minni, at hetta gongur fyri seg í Klaksvík sigur sangarin, sum nú býr í Hósvík.

### Datt upp á stóra pallin

Tey bæði fyrstu árini á festivalinum var pallurin hjá Hanusi tó ikki stórur. Intimi Silva-pallurin hóskaði kanska eisini betri til hansara stíl, og tó at tað serliga fyrsta árið var sera trongligt hjá áskoðarunum, so merkti hetta ikki framførsluna sum so.

Í so máta kann nærum sigast, at Hanus í fjør datt upp á stóra pallin, tá mjørkin av álvara fór at arga vesturi í Vágum. At útlendsku stjørnurnar vóru seinkaðar kom føroysku bólkunum til gagns, og saman við Eyðun & Terja og Anfinn & Co. var Hanus so heilt avgjørt ein av høvuðsorsøkunum – og kanska tann størsta – til at festivalurin kortini varð bjargaður. At talan var um kanska størstu fjøldina, sum Hanus nakran tíð hevur staðið fyri, tóktist í øllum førum ikki nerva tað minst, tá upprunaskráin á hálvan tíma varð tambað til tað trífalda.

Tað mundi ganga hampuliga væl. Eg havi eisini spælt á Land & Folk í Danmark, har áskoðarafjøldin hevur verið út ímóti tí sama. Men tað er sjálvandi nakað annað, tá talan er um áttaníggjutúsund føroyingar, sum kenna flestu av sangunum.

Hesa ferð er tó eingin ivi um, at Hanus er eitt av stóru nøvnunum. Fríggjakvøldið verður tað hann, sum fær seinasta orðið á stóra pallinum. Og tá sjálvastir Scorpions standa fyri upphitingini, fær tað neyvan verið størri.

Talan er í øllum førum um stórar kontrastir í so máta, sigur Hanus flennandi.

Men tað er sjálvandi eisini eitt stórt herðaklapp at fáa tann møguleikan. Og so má tíðin vísa, hvussu tað fer at ganga, sigur hann lítillátin.

### Fáa tað tey ynskja

Tá prátið var gjørt, vóru bert góð tvey samdøgur, til Hanus skuldi á palling. Men enn hevði hann tó ikki endaliga gjørt av, hvør skráin fór at verða hetta kvøldið.

Ikki heilt endaligt í øllum førum. Men har verða heilt víst nógvir slagarar at hoyra. Átjan, saknur og fleiri aðrir, sum fólkið helst kennur, verða so heilt víst á skránni. Tað plagar jú at vera tað, sum fólkið vil hoyra. Men hartil verður sjálvani okkurt annað blandað uppí, so eg vóni, at talan verður um eina góða og fjølbroytta konsert, sigur Hanus.

## Selja 1000 atgongumerki afturat

**Áhugin fyri Summar Festivalinum er størri enn nakrantíð, og nú verða bert 1000 atgongumerki afturat seld til festivalin**

SUMMAR FESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

Fyrstu atgongumerkini til Summar Festivalin vórðu sett til sølu fyri jól í fjør, og sølan hevur gingið sera væl. Í sambandi við freistirnar, tá ið prísurin er farin upp, eru heilt nógv atgongumerki seld, og nú er farið at ganga undan við atgongumerkjum.

Í mesta lagi 10.000 fólk kunnu sleppa inn til Summar Festivalin, og hetta mark verður sett, so at tey, ið koma á festival, fáa eitt gott upplivilsi og hava pláss á festivaløkinum.

Nú boða fyrireikararnir av Summar Festivalinum so frá, at tað verða bert seld góð 1.000 atgongumerki afturat í forsølu. Tá ið hesi atgongumerki eru seld, verður sølan steðgað.

Tað hevur verið upp á tal at selja dagsbillettir við dyrnar, men hetta verður bert gjørt, um atgongumerki verða eftir, tá festivalurin byrjar.

Vikuskiftispass fáast á Shell-støðunum og í Telebúðunum kring landið.